Ramsarteljingar og – kanningar 2025

TJÓÐSAVNIÐ
FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM
NATURE AND CULTURE

Lundi í Mykinesi, Drunnhvíti í Nólsoy, Sýldur drunnhvíti í Mykinesi og Heiðafuglur í Skúgvoy

Authors: Jón Aldará og Leivur Janus Hansen

Year: 2025

Title:
Ramsarteljingar og – kanningar 2025

Citation:
Aldará, J., Hansen, L.J. 2025. Ramsarteljingar og – kanningar 2025. Tjóðsavnið. Frágreiðing 2025-2. 26pp.

Author(s):
Jón Aldará og Leivur Janus Hansen

Report nr.:
2025-2

Case nr.:
25/08900

Pages:
26

Nógv virksemi var við fugli í Ramsar oyggjum í 2025. Í Mykinesi varð, sum vant, tal sett á hvussu nógv kom undan hjá lundanum vestanfyri bygdina; Í Nólsoy varð, fyri fimtu ferð, tal sett á hvussu nógv pør av drunnhvíta reiðraðust í einum øki Suðuri í Dølum; Annað árið á rað var arbeitt við sýldum drunnhvíta: í Mykinesi vóru merkir sett á fuglar, sum við tíðini fara at geva eina mynd av ferðing alt árið, umframt í bútíðini; Í Skúgvoy varð heiðafuglur taldur eftir R250 teljiháttinum og eisini eftir einum eldri teljingarhátti.

TJÓÐSAVNIÐ
Faroe Islands National Museum
Kúrdalsvegur 15
188 Hoyvík
Faroe Islands

+298 340 500
tjodsavnid@savn.fo
www.savn.fo

INNIHALDSYVIRLIT

LUNDI Í MYKINESI 4

Endamál 4
Mannagongd 4
Virksemi 4
Úrslit 9

DRUNNHVÍTI Í NÓLSOY 11

Endamál 11
Mannagongd 11
Virksemi 11
Úrslit 13

SÝLDUR DRUNNHVÍTI Í MYKINESI 14

Samanumtøka 14
Endamál 14
Samstarv 15
Toymi 15
Mannagongd 16
Úrslit 18
Niðurstøður og ætlanir 18

HEIÐAFUGLUR Í SKÚGVOY 20

Endamál 20
Mannagongd 20
Virksemi 21
Úrslit 21
Niðurstøður 24

ANNAÐ 25

Tøkk 25
Keldur 25

LUNDI Í MYKINESI

ENDAMÁL

Málið er at fáa eitt yvirlit yvir búfuglin í Mykinesi og gongdina hjá honum. Í 2025 skuldi metast um gongdina hjá lundanum vestan fyri Mykines bygd.

MANNAGONGD

Mannagongdin, ið nýtt varð, er útgreinað í Lundi *Fratercula arctica grabae*: mannagongd fyri teljing – dagførd 2022 (Hansen, 2023). Hvørt einstakt 10m^2 (30m m^2 í 2011-12) økið í einum 20x20m punti verður í hesi frágreiðing nevnt ein puntur. (Talva 1). Holur vórðu kannaðar fyri at telja, hvussu nógvar pisur kundu væntast floygdar. Tað varð gjørt við at hyggja eftir, um feskur skvettur var í holuni. Mannagongdin við skvetti varð í 2023 eftirkannað soleiðis, at holur, sum fyri víst høvdu pisu, vórðu kannaðar fyri skvett. Úrslitið frá tí kanningini verður nýtt til at kalibrera teljingarúrslitini hvørt ár.

Teljarar vóru Coralie Cazals og Natacha Planque umframt 3 sjálvboðin: Ben Porter, Feliksa Zurawska og Trevor MacLaurin.

VIRKSEMI

Í August 2025, varð kannað í hvønn mun holur høvdu verið nýttar. Tá verður hugt eftir, um mold liggur útfyri holuna, um grasið er traðkað, um skvettur sæst og so framvegis. Mannagongdin er, at um skvettur sæst í holuni, varð mett at ungi var í holuni.

Síðani 2011 eru puntar kannaðir í Lamba og Dalinum. Harumframt varð ein puntur kannaður í Hólmi í 2012. Samlað tal av holum, brúktum holum og tal av holum við ungum varð talt í hvørjum útvaldum punti. Í 2011 og 2012 vórðu heilt fáir puntar kannaðir; fýra í 2011 og fimm í 2012. Tá varð kannaða flatan lutfalsliga stór, 30 m^2. Í 2013 til 2025 varð flatan í kannaðu puntunum minni, 10 m^2 og talið av puntum var hægri; fyri hvørt ár ávikavist 27, 46, 44, 91, 88, 92, 82, 110, 94, 149 og 139. Fyri flestu árini var galdandi, at í onkrum av puntunum var als eingin hola.

Mynd 1. Brúnir puntar vóru kannaðir við endoskopi. Gráir puntar vóru kannaðir fyri skvett. Støddin á reyða prikkinum endurspeglar hvussu nógvar holur høvdu ábending um pisu (2014-2024) ella høvdu egg (2011-13).

2011

2012

2013

2014

2015

2016

2017

2018

2019

2020

2021

2022

2023

2024

2025

Mynd 2. Sildberi

Mynd 3. Teljing av holum í Lamba í 2023

ÚRSLIT

Í kanningini í 2025 vóru 654 holur í 138 puntum. Av hesum vístu 304 tekin um brúk. Av hesum 304 holum vóru 151 við skvetti í holuni.

Í 2023 varð kannað, hvussu nógvar holur, har ungi hoyrdist, ella har vaksin fuglur bar nebbasild inn, eisini sóust hava skvett í holumunnanum. Tað vísti seg at vera 93%.

Tá talið av holum við skvetti í 2025 verður roknað saman við áðurnevndu 93%, so vóru tað 25% av holunum við pisu. Tað eru um 60.000 holur vestanfyri bygdina (Hansen, Simonsen, & Danielsen, 2013) og tískil er endaliga úrslitið 14.759 livandi pisur.

Talva 1. Tal av óbrúktum (Óbr.) og brúktum (Brúkt.) holum umframt tal av pisum í taldu økjunum í Mykinesi frá 2011-2025

	Lamba			Dalurin			Hólmur		
	Óbr.	Brúkt.	Pisa	Óbr.	Brúkt.	Pisa	Óbr.	Brúkt	Pisa
2011	93	56	0	97	44	0			
2012	43	99	0	42	74	0	14	18	0
2013	41	91	0	47	82	0			
2014	60	105	4	40	108	4			
2015	34	104	9	39	102	5			
2016	*109*	*196*	*<85*	*187*	*207*	*<44*			
2017	35	164	87	81	153	69			
2018	61	187	72	116	145	41			
2019		*123*	*<50*		*176*	*<170*			
2020	*48*	*159*	*22*	*94*	*186*	*36*			
2021	*33*	*185*	*34*	*153*	*241*	*52*			
2022	*36*	*330*	*126*	*97*	*388*	*138*			
2023	*67*	*403*	*202*	*122*	*314*	*161*			
2024	*54*	*295*	*82*	*79*	*233*	*84*			
2025	*257*	*93*	*88*	*93*	*211*	*63*			

Mynd 4. Grøna linjan er lutfallið av brúktum holum og svarta linjan er lutfalli av holum við pisum (t.e. undankoma ella produktión).

DRUNNHVÍTI Í NÓLSOY

ENDAMÁL

Málið er at fáa eitt yvirlit yvir búfuglin í Nólsoy og gogndina hjá honum. Í 2025 skuldi teljast eyðsýniliga reiðursholur fyri 5. ferð síðani 2013, og verður hetta talið brúkt til at meta um gongdina hjá drunnhvítanum.

MANNAGONGD

Mannagongd til teljingina er *Drunnhvíti: Mannagongd fyri teljing — Dagførd í 2022. Tjóðsavnið.*

Í stuttum kann sigast um mannagongdina, at látið hjá drunnhvíta verður spælt og drunnhvíti, ið svarar, verður skrásettur. Tað er tó ikki allur drunnhvíti, ið svarar, tá lát verður spælt. Tí er neyðugt eisini at kanna, hvussu stórur partur svarar. Tað verður gjørt við at vitja kalibreringsøki fleiri ferðir, inntil mett verður, at øll reiður í økinum eru skrásett. Út frá hesum kann roknast, hvussu nógv svar eru í mun til reiður. Eisini verður sama økið talt árliga, og soleiðis kann metast um gongdina hjá stovninum.

VIRKSEMI

Í 2025 vórðu 2 økir tald. Kalibreringsøkið á Dølum varð talt 9 ferðir av Jón Aldará, Regin Olsen og Melanie Mellemgaard, meðan kalibreringsøki í Urðini varð talt 15 ferðir av Ben Porter, Feliksa Zurawska og Trevor MacLaurin, sum øll vóru sjálvboðin. Økið á Dølum er frammanundan talt í 2013, 2020, 2021 og 2024. Økið í Urðini er bert talt eina ferð fyrr, í 2013. Tølini úr Urðini í 2025 eru ikki við í hesi frágreiðing orsakað av tíðaravmarkingum í samband við viðgerð av dátunum. Hesi tølini verða tí við í seinni frágreiðing.

Mynd 5. Kalibreringsøkið (merkt við reyðum kassa) varð talt fyri hvørja vitjan

Mynd 6. Kalibreringsøkið í Dølum og teljararnir í 2024

Mynd 7. Ein av fýra álunum, sum talt verður eftir suðuri á Dølum

ÚRSLIT

Kalibreringsøkið í Dølum er 60 m langt og flatan 3000 m². Her vórðu 4 álir á tilsamans 480 m² taldar. Eftir at hava talt økið 9 ferð í 2025 varð niðurstøðan, at her vóru 54 reiður. Tað er ov tíðliga at gera eina niðustøðu um stovnsgongd. Tølini tykjast eisini at sveiggja nokkso nógv, og tískil skal gongdin skrásetast ofta fyri at síggja eitt mynstur.

Miðal aftursvar	0,214 svar pr. reiður
Standard frávik	0,139

Mynd 8. Miðal aftursvar við standard fráviki í kalibreringsøkinum í Dølum.

Miðal tættleiki av reiðrum	0,113 reiður pr. m²
Standard frávik	0,055

Mynd 9. Tættleiki við standard fráviki í kalibreringsøkinum í Dølum.

SÝLDUR DRUNNHVÍTI Í MYKINESI

Lutvíst skrivað av Stephen John Hurling (The Agricultural University of Iceland).

SAMANUMTØKA

Kanningar vísa, at stovnar av sýldum drunnhvíta (*Hydrobates leucorhous*) eru í afturgongd í Atlantshavinum, Kanada, Íslandi og Skotlandi. Orsøkin til hetta er ókend; tó heldur slagið mest til á sjónum og flytir langar teinar suður um miðkringin, og kann tí vera útsett fyri ávísum hóttanum. Hóast versnandi støðuna hjá sýldum drunnhvíta í heimshøpi, so er føroyski stovnurin lítið kannaður, og dátur um m.a. stovnsstødd, útbreiðslu og føði eru vantandi. Sum ein byrjan til at fáa fleiri dátur til vega varð merkingarverkætlan sett í verk á sumri 2024 í samstarvi millum Tjóðsavnið, SEATRACK og Environment and Climate Change Canada (ECCC).

Sýldir drunnhvítar verða merktir í Mykinesi og á Mykineshólmi við GLS-merkjum (Global Location Sensor, >0,5g), fyri at spora teirra ferðamynstur alt árið við 12 tíma millumbilum. Í 2025 vórðu 8 av teimum 18 GLS-merktu sýldu drunnhvítunum frá 2024 afturfingnir; tó hevði ein teirra mist sítt merki, og tískil vóru 7 GLS-merkri afturfingin. Dáturnar eru í løtuni í viðgerð hjá SEATRACK, og úrslitini fyriliggja væntandi í februar 2026. Tá fæst fyri fyrstu ferð innlit í ferðamynstrið hjá føroyskum sýldum drunnhvíta gjøgnum árið, umframt m.a. nær reiðring, verping og kleking fara fram. 20 fuglar aftrat fingu ásett GLS-merkir í 2025, og tískil eru tilsamans 30 fuglar við GLS-merkir møguligir at fanga í 2026.

Undir verkætlanini verða vitan og førleikar skift millum føroyskar lívfrøðingar og altjóða samstarvsfelagar til tess at styrkja haldførið innan gransking av sýldum drunnhvíta í Føroyum. Hægstu raðfestingarnar fyri granskingina av hesum slagnum frameftir eru fyrst og fremst at greina komandi GLS-dáturnar fyri at avdúka útbreiðsluna á havinum árið runt, at sammeta hesa útbreiðslu við økir, har møguligar hóttanir fyrikoma, og at gera eina stovnsmeting fyri landi sum grundarlag fyri áhaldandi stovnseftirlit og møguligum verndarátøkum.

ENDAMÁL

Heimsstovnurin av sýldum drunnhvíta (*Hydrobates leucorhous*) hevur síðani 2016 verið mettur sum 'vulnerable' (viðbrekin) á reyðlistanum yvir hótt sløg hjá IUCN orsakað av eini afturgongd við ≥30% síðstu trý ættarliðini. Í Atlantshavsøkinum minka stovnarnir: Í Kanada, har meira enn 90% av atlantshavsstovninum reiðrast, er aftugongdin 54% síðstu trý ættarliðini; grannastovnarnir í Íslandi eru mettir at vera afturfarnir 40-49% síðan 1991, og í Stóra Bretlandi er stovnurin mettur at vera minkaður 79% síðan 1998. Orsøkin til hesa gongd er enn ókend, men roknast má við at hon er partur av mannaskaptu lívmarfeldiskreppuni.

Í eystara Atlantshavinum eru størstu sýldu drunnhvítastovnarnar í Skotlandi og Íslandi, síðani kemur tann í Føroyum og tann minsti er í Norra. Føroyski stovnurin er leysliga mettur til 1000 pør, sum higartil bert eru funnin á Mykineshólmi og vestast í Mykinesi. Hóast at føroyski stovnurin er týðandi í Evropeiskum høpi, so eru dátur vantandi: ongin skipað stovnsteljing hevur verið gjørd, onki eftirlit er við stovnsgongd, og lítil vitan er um føði og útbreiðslu. Tá hugsað verður um stóru afturgongdina í grannalondunum og í heimshøpi, er tað av alstórum týdningi at fáa tær neyðugu dáturnar um føroyska stovnin til vega.

Sum fyrsta stig í hesum arbeiði er høvuðsendamálið við hesi kanning at lýsa útbreiðsluna hjá føroyskum sýldum drunnhvíta (a) á sumri undir reiðring og (b) í flytitíðini og á vetri. Innsavnaðu dáturnar verða síðani nýttar til at

(c) lýsa føði og atburð undir leitan eftir føði og (d) kortleggja útbreiðslu hjá føroyskum sýldum drunnhvíta saman við økjum á sjónum, har møguligar hóttanir fyrikoma.

Kanningin fevndi um reiðrandi fugl á sumri í bølunum í Mykinesi og á Mykineshólmi vestast í Føroyum.

SAMSTARV

Hendan kanningin varð framd í samstarvi við altjóða verkætlanini SEATRACK (SEAbird TRACKing) og Environment and Climate Change Canada (ECCC), sum er almenni náttúru- og umhvørvisverndarstovnurin í Kanada. Endamálið hjá SEATRACK er at kortleggja útbreiðsluna uttanfyri reiðurstíð hjá sjófuglasløgum, sum reiðrast í Norðatlantshavinum. Leiðarar av hesi verkætlan eru Norsk Polarinstitutt (NPI) og Norsk institutt for naturforskning (NINA), og dátur verða framleiddar av luttakarum úr 14 londum, harímillum Føroyar. 3. stig í verkætlanini (2023-2026) tekur sýldan drunnhvíta við fyri fyrstu ferð. Tí lat SEATRACK 20 GLS-merkir til at spora sýldan drunnhvíta í Føroyum á sumri 2024.

Samstarvsfelagin í ECCC, Dr. April Hedd, hevur síðan 2002 staðið fyri eini langtíðarkanning av demografi og vistfrøði hjá sýldum drunnhvíta í Nýfundlandi, og í 2014 varð sporing tikin við í kanningina. Í 2024 lat ECCC 22 GPS-merkir til sporing av reiðrandi føroyskum drunnhvíta.

TOYMI

Í 2024 var verkætlanartoymið samansett av 4 granskarum: verkætlanarleiðari Jón Aldará, lívfrøðingur á Tjóðsavninum; høvuðsráðgevi Stephen Hurling, PhD-lesandi á Landbúnaðarháskóli Íslands við stovnslívfrøði, føði og útbreiðslu hjá sýldum drunnhvíta sum høvuðsgranskingarmál; lívfrøðingur Servane Kiss, fyrrverandi vistfrøðingur á Institut Polaire Francais Paul-Émile Victor (IPEV) í Antarktis við 2-ára royndum við sýldum drunnhvíta og sporing í Íslandi; og Coralie Cazals, djóralækni og fyrrverandi lívfrøðingur á IPEV í Antarktis. Haraftrat luttóku Elisabeth Knudsen, lívfrøðingur og PhD-lesandi, og Silas Olofson, fuglaáhugaður, í feltarbeiðinum í Mykinesi.

Í 2025 var arbeiðstoymið Coralie Cazals, sum eisini var við í 2024, og Natacha Planque, lívfrøðingur, ið fyrr hevur arbeitt á IPEV í Antarktis eins og onnur í toyminum.

Mynd 10. Servane Kiss, Stephen Hurling og Coralie Cazals, sum saman við Jón Aldará GLS- og GPS-merktu sýldan drunnhvíta í 2024.

MANNAGONGD

At finna atkomiligar holir

Sýldur drunnhvíti heldur í høvuðsheitum til á sjónum og kemur bert á land undir reiðring á sumri. GLS-merkir kunnu setast út allar tíðir undir reiðring og síðani fáast aftur undir reiðring árið eftir. Tó eru drunnhvítar sum heild erkvisnir um órógv við reiðrið og kunnu rýma frá tí, og tí má veljast hóskandi tíðarskeiðir til at fanga fuglarnar. Hetta er serliga stutt uppundir kleking.

Holur verða funnar við at spæla lát frá sýldum drunnhvíta við hátalara: fyrst látið hjá bøgu og síðani hjá steggja. Um aftursvar hoyrdist frá eini holu, verður inngongdin funnin og merkt við pinni. Síðani verður kannað, um reiðrið er atkomiligt í holuni, við at grópa varliga, og reiðursstøðan verður síðani mett við at merkja við hondini eftir, um egg ella ungi er til staðar: øll reiður við fugli, sum bølir á eggum, eru hóskandi til sporing.

Útsetan av GLS-merkjum

SEATRACK veitir GLS-merkir (Global Location Sensor, Intigeo-W30A9-SEA; Migrate Technology, Cambridge, U.K.), sum viga 0,45g. Hesi hava ljósvarnara og savna dátur um dagsljós í mun til tíð á degnum (GMT), sum kunnu nýtast til at rokna knattstøðu við lægri loysni. Dátur verða savnaðar tvær ferðir um dagin í upp til 15 mánaðir. Tey kunnu tískil fáast aftur árið eftir.

Í samsvar við viðurkendar mannagongdir verða fuglarnir í hesi verkætlan fyrst fangaðir í reiðrinum og merktir á høgra leggi við stálringi frá Ringmærkningscentralen á Statens Naturhistorisk Museum, Danmark. Vekt og veingjamát verða tikin, síðani verður GLS-merki sett á fuglin, og at enda verður hann settur í holuna aftur. Hetta tekur í mesta lagi 10 minuttir fyri hvønn fugl. GLS-merkini sita føst á einum 3D-prentaðum plastringi, sum verður sett um vinstra leggin.

At fáa GLS-merkir aftur

Orsakað av, at merkini eru so smá, kunnu tey bert goyma dátur og ikki senda. Tí mugu tey fáast aftur, so dáturnar kunnu koma til høldar. Roynt verður at fáa øll GLS-merkini aftur aftaná 1 ár, tó at tey í ringasta føri kunnu verða á fuglunum í 2 ella fleiri ár. Ymiskar umstøður kunnu føra til, at fuglurin ikki fæst aftur, m.a. at skiftir holu/maka ella at hann doyr. Tí er tað ósannlíkt at fáa øll merkini aftur.

Í reiðurstíð árið eftir, at merkið er sett út, verður kannað, um fuglurin er komin aftur í holuna, og um so er, so verður merkið tikið av honum. Tá verður fuglurin tikin úr holuni, merkið tikið av, kropsmát tikin (vekt og veingjamát) umframt blóð, fjaðrar og skarnsýnir, og fuglurin verður síðani settur inn í holuna í mesta lagi 10 minuttir eftir, at hann varð tikin úr.

Kropsmát verða tikin fyri at meta um heilsustøðu og samanbera millum kyn og bølir aðrastaðni. Blóð verður nýtt til at greina kyn, og her verður bert ein dropi tikin frá høvuðsæðr á veinginum (brachial vein). Fjaðrar, sum veksa um veturin (S4, vinstru og høgru) verða tiknir og sendir til isotopgreining (stable isotope analysis). Hetta gevur upplýsingar um støðið (trophic level) hjá fuglinum í sínum føðineti og óbeinleiðis upplýsingar um, hvørji djór eru partur av føðini. Til at kanna føðina um summarið verða skarnsýnir tikin frá gotinum við vattpinni, sum verður nýtt til DNA metabarcoding, sum kann vísa, hvørji sløg av verum eru partur av føðini.

Mynd 11. GLS-merking av sýldum drunnhvíta er umfatandi og nærlagt arbeiði. Her vigar Servane fuglin, meðan Coralie skrivar niður.

Dátuviðgerð

Spordátur verða greinaðar í samstarv við samstarvsfelagar í SEATRACK.

Úr GLS-dátunum verða knattstøður framleiddar við einari "threshold"-mannagongd, har mátaðu náturligu ljósmongdirnar vísa longd á degi mótvegis nátt og kunnu harvið meta um breiddarstig, og har ásetingin av middegi og midnátt í mun til GMT kann nýtast til at meta um longdarstig. Týðandi vetrarøkir kunnu síðani lýsast við kjarnutættleika (kernel density estimation) og harvið vísa nýtsluútbreiðslu (utilization distribution, 50, 75 og 90%) um veturin.

ÚRSLIT

8 fuglar, sum vórðu GLS-merktir í 2024, vórðu fangaðir í 2025. Av hesum hevði 1 mist sítt merki, og tí eru 7 spor komin til vega. Hesi sporini eru til viðgerðar hjá tøkningum á SEATRACK og væntast at vera tøk í februar 2026. Tá verður eyka frágreiðing gjørd um hetta.

Samstundis vórðu tilsaman 20 nýggj GLS-merkir sett á sýldar drunnhvítar úr øðrum holum enn teir frá 2024. Fyri hvørja holu, sum nýtt varð til merking, vórðu tikin neyv GPS-knattstøða við 1cm neyvleika (RTK GPS), myndir av holumunna, og greiðar viðmerkingar um, hvussu komandi var til reiðrið inni í holuni. Hesir upplýsingar verða nýttir til at fáa GLS-merkir aftur í 2026.

Samanlagt eru nú 42 sýldir drunnhvítar merktir við GLS-merki: 4 í 2023, 18 í 2024 og 20 í 2025. Av hesum eru 8 afturfingnir, og tískil bera upp til 34 fuglar enn GLS-merki, sum kunnu fáast aftur í 2026 ella seinni.

NIÐURSTØÐUR OG ÆTLANIR

At hava fingið 8 aftur av 42 GLS-merktum sýldum drunnhvítum er eitt stórt og týðandi framstig innan granskingina av hesum slagnum í Føroyum. At hava víðkað um serfrøðina og arbeiðsorkuna í hesum kanningartoyminum umfram betrað um mannagongdir millum 2023 og 2024, hevur í 2025 víst seg at geva serstakliga gott úrslit. Hetta fær eisini Føroyska arbeiðið upp á somu støðu sum tað, sum verður gjørt í Íslandi við sýldum drunnhvíta, har 50% av av GLS-merkjunum eru afturfingin seinastu 3 árini. Samanborið við hetta vórðu 44% av merkjunum frá 2024 fingin aftur í 2025.

Umframt at veita útbreiðsludátur fara afturfingin GLS-merkir fyrstu ferð at geva nøkur nágreinilig innlit í reiðurstíðina hjá føroyskum sýldum drunnhvíta. Dátur frá hesum merkjunum kunnu staðfesta fyri hvønn fugl, nær hann kemur til bøli at reiðrast (og ferð avstað), nær hann verpur, og nær pisan verður klakt. Hetta gevur eisini eitt týðandi grundarlag undir granskingina av hesum slagnum í Føroyum frameftir, so betri kunnaðar avgerðir kunnu takast um, nær fuglurin bølir á eggi/pisu, og hvussu arbeiðið síðani skal leggjast til rættis.

Sýldur drunnhvíti er í afturgongd um alt Atlantshav og dátur vanta fyri stovn, føði og útbreiðslu í Føroyum. Tí er meira gransking alneyðug. Dátur, sum fáast aftur frá GPS- og GLS-merkjum, sum eru sett út í 2024 og 2025, eru ein beinleiðis partur av at nøkta hendan tørvin. Sýldur drunnhvíti er flytifuglur, sum ferðast um miðkringin, og er útsettur fyri alskyns samansettum hóttanum bæði á landi undir reiðring og á sjónum uttanfyri reiðring. Spor- og føðidátur gera tað møguligt fyri fyrstu ferð at kortleggja útbreiðsluna av føroyskum sýldum drunnhvíta saman við hóttanum á sjónum. Hetta kann styrkja um áseting av m.a. IBA (Important Bird Area)

og/ella MPA (Marine Proctected Area) í týðandi økjum og betra um umsiting av burðardyggum fiskiskapi. Hendan granskingin kann sum heild hava týðandi ávirkan á verndarátøk.

At enda er neyðugt at undirstrika, at hendan kanningin áhaldandi førir til góða upplæring og royndir millum granskarar úr útlandinum og føroyskar lívfrøðingar. Tí er hetta arbeiðið vónandi og væntandi bert ein byrjan til at tryggja, at føroyski stovnurin av sýldum drunnhvíta verður varðveiddur í alla framtíð.

HEIÐAFUGLUR Í SKÚGVOY

ENDAMÁL

Endamálið við teljingini er, at á hvørjum ári skráseta og kortleggja øll reiðrandi heiðafuglapør í Skúvoy og harvið fylgja við stovnsgongdini hjá heiðafuglasløgunum. Heiðafuglur í hesum føri fevnir um hesi 9 sløg: skúgvur (*Stercorarius skua*), kjógvi (*Stercorarius parasiticus*), tjaldur (Haematopus ostralegus), spógvi (Numenius phaeopus), lógv (Pluvialis apricaria), mýrisnípa (Gallinago gallinago), steinstólpa (Oenanthe oenanthe), grátítlingur (Anthus petrosus) og summartítlingur (Anthus pratensis). Onnur sløg verða eisini tald eftir høvi. Teljingin byrjaði í 2010 og hevur undantikið í 2011 verið framd hvørt ár síðan og fram til 2025.

MANNAGONGD

Teljingin verður gjørd seint í juni, tá øll fuglasløgini, ið eru fevnd av teljingini, hava egg ella ungar.

Høvuðsmannagongdin er gonguteljingin, sum hevur verið nýtt síðan 2010. Til hetta verður oyggin býtt sundur í 6 teljiøkir: teir 5 hagapartarnar og innangarðsøkið. Teljarin gongur aftur og fram í lendinum við 100-300 metrum millum gonguleiðirnar og skrivar fugl inn á kort. Fuglurin verður mettur at vera reiðrandi ella ikki-reiðrandi alt eftir atburði. Fyrimunurin við hesi teljing er, at tað ber til at skráseta næstan allan fugl, sum reiðrast har, sum gangandi er. Vansin er, at mannagongdin ikki ítøkiliga staðfestir, hvar teljarin skal ganga, og hvussu langa tíð hann skal telja. Hetta ger, at munir kunnu vera millum, hvussu teljingar eru framdar ymisk ár alt eftir hvør telur, og tískil kann hagfrøðiliga greiningin av tølunum gerast veik.

Mynd 12. Vatnsdalur í Skúvoy undir heiðafuglateljingini 2024

Aftrat gonguteljingin verður gjørd ein punktteljing, ið nevnist R250 og varð nýtt í oynni fyri fyrstu ferð í 2022. Her fer til teljarin til frammanundan útvaldar knattstøður, bíðar í 5 minuttir og skrásetur síðan í 10 minuttir allar einstakar fuglar innanfyri 250 metra radius. Samstundis skrásetir teljarin frástøðu og vinkul til hvønn fugl (við frástøðumátara og kumpass), og tilskrivar hvørjum fugli eitt ítøkiligt slag av atferð og/ella umstøðu, sum

kann veljast á einum lista á skrásetingarblaðnum. Atferð og umstøður geva ábending um, hvørt fuglurin er reiðrandi ella ikki. Fyrimunurin við hesi teljing er, at hon er so óheft av teljaranum, sum til ber, og at hon staðfestir m.a. greitt, hvar teljarin er, tá hann telur, hvar fuglurin er í mun til teljaran, og hvussu leingi talt verður. Hetta ger, at teljingin kann endurtakast á júst sama hátt hvørt ár, og at tølini eru løtt at arbeiða við hagfrøðiliga. Vansin við R250 er, at hon kann ikki nýtast til at telja allan fuglin í oynni, og dáturnar kunnu tí ikki beinleiðis samanberast við tær frá teljingum áðrenn 2022.

Mannagongdin til gonguteljingina er útgreinað í "Leiðbeining til teljing av heiðafugli í Skúvoynni á sumri" (Olsen 2018). Mannagongdin til R250-teljingina er útgreinað í 'R250 Breeding Bird Count" (Hansen & Aldará 2022).

VIRKSEMI

Í 2025 vórðu gonguteljingin og R250-teljingin gjørdar í senn, og fóru tær fram á døgunum 26. og 27. juni og 2. juli. Teljararnir vóru Jón Aldará umframt Natacha Planque, sum var sjálvboðin.

Mynd 13. Steinstólpa er eitt tað talríkasta fuglaslagið í Skúvoy

ÚRSLIT

Í gonguteljingini vórðu 4 hagapartar taldir í tíðarskeiðinum 26.-27. Juni og 1 hagapartur og innangarðsøkið vórðu tald 2. juli. Tilsamans vóru allir 35 ringarnir taldir (Mynd 14).

Tøl fyri tey 9 heiðafuglasløgini frá báðum teljingunum síggjast í Mynd 16.

Mynd 14. Tal av sløgum í R250-ringunum, sum vórðu taldir í Skúvoy í 2022 til 2025. Ljósast (gult) er hægsta tal og myrkast er lægsta tal.

Mynd I5. Tal av búpørum í R250-ringunum, sum vórðu taldir í Skúvoy í 2022 til 2025. Ljósast (gult) er hægsta tal og myrkast er lægsta tal.

NIÐURSTØÐUR

Talríkastu fuglasløgini í 2025 vóru steinstólpa, grátítlingur og skúgvur. Haraftrat er vert at leggja til merkis, at lógv hevur tikið seg fram síðstu 4 árini, serliga í mun til 2022. Grátítlingur og skúgvur eru eisini so smátt men støðugt vaksandi. Stórt fall av skúgvi er skrásett í Skúvoy orsakað av fuglakrími í 2022 (Sjúrður Hammer, pers.comm.), og tí kann talið enn roknast við at vera væl lægri enn undanfarin ár.

Talið á reiðrandi pørum millum 2022-2025 tykist sum heild at vera støðugt fyri flestu sløgini. Steinstólpa var serstakliga talrík í 2024, men tølini fyri 2025 líkjast meira árunum 2022-2023. Tó má eitt ávíst fyrivarni takast fyri samlaðu tølunum frá teljingini í 2022 orsakað av, at hagaparturin Bergið varð taldur síðst í juli. Hetta er seint í bútíðini, og tølini kunnu tá síggja øðrvísi út, enn tey høvdu gjørt um mánaðarskiftið juni/juli, m.a. tí at reiðrandi fuglar og floygdir ungar kunnu reika út um teirra búøki hesa tíðina.

	Skúgvur	Kjógvi	Tjaldur	Spógvi	Mýrisnípa	Lógv	Steinstólpa	Grátítlingur	Summartítlingur
2022	50	34	38	19	30	13	71	58	4
2023	47	40	53	37	31	30	103	60	19
2024	62	31	27	33	16	32	150	71	22
2025	69	30	30	30	23	43	87	85	19

Mynd 16. Tøl tilsaman av pørum av heiðafuglasløgunum í Skúvoy, tald í gonguteljingini í 2022-2025.

Í hesi frágreiðing eru tølini frá gonguteljingini í tíðarskeiðnum 2022-2025 ikki samanborin við tey frá undanfarnum árum. Hetta er orsakað av, at tølini sveiggja óvanliga nógv ímillum ár, og hetta kann stava frá ókendum munum í teljingarhátti millum ár. Tí mugu undanfarnu teljingar frameftir nýtast við ávísum fyrivarni og møguliga eftirkannast og tillagast hagfrøðiliga fyri at tryggja sambæri.

ANNAÐ

TØKK

Tey, ið varða av høgunum í Skúgvoy, Mykinesi og Nólsoy, skulu hava takk fyri vælvild. Tøkk til Skúvoyar Kommunu og Jóanis í Hoygarðinum, borgarstjóra, sum veittu innivist og hjálp til teljararnar í samband við Heiðafuglateljingina. Tøkk til skúvoyingar, sum komu við góðum ráðum og eygleiðingum til teljararnar. Somuleiðis tøkk til Mykinesfólk, sum hava víst áhuga og veitt ráð og hjálp.

Haraftrat tøkk til:

Børge Moe og onnur frá SEATRACK fyri at hava veitt neyðug granskingarútgerð, mannagongdir og ráðgeving.

Asbjørn Østerø á Vitaverkinum fyri innivist í vitapassarahúsunum í Mykineshólmi.

Jógvan Thomsen, Ben Porter og Anne Ausems fyri hjálp og samráð í samband við drunnhvíta.

Ein serlig tøkk til Ben Porter, Feliksa Zurawska og Trevor MacLaurin, sum sjálvboðin hjálptu við lundateljing og arbeiðinum við sýldum drunnhvíta í Mykinesi, og til Natacha Planque, sum sjálvboðin hjálpti við heiðafuglateljing í Skúvoy. Eisini eigur Stephen Hurling eina tøkk fyri áhaldandi ráðgeving. Uttan hesar eldsálir hevði verið trupult at útint hetta arbeiðið við tí góðsku, sum úrslitini hava fingið.

KELDUR

Ferdinand, L., & Jensen, E. (1991). *Fuglaljóð. Ljóðbond*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur.

Hansen, L. J., Olsen, B., Simonsen, W., & Danielsen, J. (2023). Drunnhvíti: Mannagongd fyri teljing — Dagførd í 2022. Tjóðsavnið.

Hansen, L. J., & Aldará, J. (2022). R250 Breeding Bird Count. Tjóðsavnið.

Olsen, B. (2018). Leiðbeining til teljing av heiðafugli í Skúvoynni á sumri. Havstovan.

TJÓÐSAVNIÐ

FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM

NATURE AND CULTURE